# Leivur Hansen og SEV

HANS TAUSEN OLSEN
fyrrv. umboðsnevndarformaður í SEV



Eftir viðtøkunum verður tað ongantíð býráðsformaðurin í Havn (Leivur Hansen), sum skal taka avgerð um at broyta SEV! Eigararnir av SEV (kommunurnar) hava valt eina umboðsnevnd, sum til eina og hvørja tíð tekur avgerðirnar, men hetta sær ikki út til at Leivur Hansen enn hevur skilt, tá ið hann sigur, at eg sum umboðsnevndarformaður skal hava verið ímóti at broyta SEV.

Sum umboðsnevndarformaður var eg við til at fáa allar viðtøkurnar broyttar í mars 2004 – einmælt samtyktar av umboðsnevndini og góðtiknar av landsstýrinum. Allar mannagongdir vóru eftir bókini! Heilar tríggjar ferðir varð uppskotið úti til hoyringar hjá røttu viðkomandi og nágreiniliga framlagdar á økisfundum av løgfrøðingi. Hesar lógir vil Leivur Hansen, stýrisformaður í SEV - saman við hansara allianса - tíverri ikki seta í verk. Hetta er trupulleikin í SEV!

SEV skuldi eftir hesar viðtøkubroytingar beinanvegin tillagast, so felagsskapurin gjørdist virkin sambært nútíðini:

SEV skal gerast ein gjøgnumskygdur felagsskapur

Fíggjarætlanin skuldi gerast gjøgnumskygd og skuldi kunna samanberast við roknskapin. T. v.s., at síggjast kann, hvussu peningurin, sum verður kravdur frá fólki, verður brúktur.

Stovna innaneftirlit (sikkerhedskvalitetsstyringssystem) sambært tilmæli frá Dansk Energi og krøvunum í Stærkstrømsbekendtgørelsen, sum eisini eru galdandi fyri Føroyar.

a)Fíggjarstjóri setast
b) Franleiðslustjóri setast
c) Stjóri fyri býtisvirkini setast

Hesir skuldu hvør á sínum øki hava evstu ábyrgd yvir fyri stýrinum.

Deild við framtíðarperspektivi sum endamáli skuldi setast

Harafturat skuldi setast ein trygdarleiðari sambært altjóða reglum, sum hevði beinleiðis tilvísing til stýrið (eigaran). Hetta hevði merkt, at hesin tyrgdarleiðari var óheftur av stjórunum í SEV. – Hetta er galdandi alla aðrataðni í Vesturheiminum!

Seta ferð á framtíðar orkuútbyggingar sum lógu á láni.

Fáa skil á starvsviðurskiftum stjórans. (Stjórin hevði sum kunnugt havt so nógv onnur størv seinastu árini, at hann lítið og onki visti um sín egna stovn)

Fáa skil á fíggjarliga óskilið í Sewave o. ø. óskili viðv. útreiðslum til uttanlandsferðir o. a.

Fremja ein starvsfólkapolitikk, sum samsvarar við nútíðina, har ein starvsfólkaleiðari fekk ábyrgdina. (M. a. so lønarviðurskiftini hjá medarbeiðarum í SEV kundu samanberast við útbúgving og førleika)

Øllum hesum framburði hevur Leivur Hansen - og hansara allianса - við sínum atburði - forðað fyri!

Nú hevur Leivur Hansen lagt fram eitt meira ella minni loyniligt uppskot um viðtøkubroytingar, sum hann sigur fer at broyta SEV. – Á fundi í umboðsnevndini tann 27. apríl 2007 hoyrdi eg ongan lim taka undir við hesum, og tí fekk hann hetta aftur í høvdið.



Ert tú so bláoygdur, at tú heldur, at tú fert at fáa umboðsnevndina at góðkenna hetta uppskot til partafelagsform, sum bert ber í sær, at tey fólkaríku økini stýra SEV?

Eru viðtøkurnar frá 2004 ikki nóg góðar, um tær bara vóru settar í verk? Ella hví bara tosa um fólkagrundarlag? Hví ikki tosa um nýtslugrundarlagið, har framleiðslurnar úti í økjunum kring Føroyar eru? Ella hvat við upprunaliga innskotspeninginum, har t. d. Havnin als ikki vildi vera við í byrjanini?

Tá ið eg tók við í 1993 sum umboðsnevndarformaður var SEV so nógv skuldarbundið, at talan var um eina skuld uppá útvið 800 mió. krónur og eini árligari rentubyrðu omanfyri 70 mió. krónur. Harafturat var SEV niðurbundið av einum sáttmála við Højgaard&Schultz, sum viðførdi, at teir til eina og hvørja tíð høvdu einarætt at gera útbyggingar upp á rokning – eina støðu, teir so sanniliga gjørdu sær dælt av. Fíggjareftirlitið var enntá á fundi við undirritaða sum umboðsnevndarformann. Teir kravdu, at gongdin mátti vendast, um SEV ikki skuldi koma undir fíggjarligt eftirlit eins og kommunurnar.

Tíbetur eydnaðist at fáa skuldina niðurgoldna og sostatt venda gongdini.

Veruleikin var fyrst í 1990-unum, at tey stóru framleiðsluvirkini – serliga í Eysturoynni - vóru í svárari neyð orsakað av vánaligari streymføring. Hóast stóra mótstøðu frá leiðsluni í SEV, so eydnaðist at fáa gjørt nakað munagott við hetta. – Serliga vil eg takka fyri góða undirtøku frá fyrrv. umboðsnevndum!

Hóast stórar íløgur og umvælingar eru gjørdar í mínari tíð sum umboðsnevndarformaður, so eydnaðist at fáa skuldarbyrðuna nærum burtur og samstundis nærum halvera prísin pr. kwt.

Nú verður tosað um at seta prísin upp og leggja alt vald til nakrar fáar persónar. – Ella møguliga selja SEV fyri 1,5 til 2 milliardir kr, sum ávísir borgstjórar hava rópt upp um - og skriva rokningina út - enn einaferð út til fólkið – ella elnýtaran.

Nei, vónandi fer umboðsnevndin ongantíð at góðkenna ætlanina hjá Leivi Hansen og hansara alliansu! Eg vil staðiliga mæla Leivi Hansen og hansara ódemokratisku alliansu til at leggja frá sær, áðrenn tit fullkomuliga forkoma SEV, sum hevur so stóran týdning fyri Føroyar og føroyingar – uttan mun til, hvar teir búgva í oyggjunum.

Eg skal ikki skriva meira á hesum sinni, men eg havi nógv tilfar liggjandi, sum prógvar, at SEV er meira enn ein senil og ódemokratisk organisatión!

29. mai 2007

# Færøeske fodbold tosserier

SVEN-ERIK REYNHEIM PETERSEN

Indrømmet, jeg er det man kalder en fodboldtosse. Ser alle de ineressante kampe, der sendes og lykkes til og med at overvære en del kampe live. Glæder mig over enhver god fodboldkamp, selvom jeg helst ser Brøndby, Barcelona, Liverpool og B36 vinde.

Jeg er så heldig at være gift ind i en fodboldtosset Færøsk familie, så derfor følger jeg nøje med hvad der sker på Færøerne. Da jeg tilmed kommer regelmæssigt på besøg, undersøger jeg altid om min rejse passer med en af de interessante kampe i den færøske EM gruppe. Italien næste gang! Større kan det vel ikke blive, men den dag spiller Danmark sin afgørende kamp mod Sverige i Parken, så den går ikke. Men – om onsdagen hvor Danmark møder Lichtenstein – kommer Skotland på besøg!

Det er som regel en spændende nordatlantisk kamp og forhåbentlig med mange festlige skotter i byen. Så kommer chocket: Kampen skal spilles på Svangaskarði! Det må da være løgn? Har man ikke fået afviklet det tossede princip, at hver anden kamp skal spilles på dette totalt charmeforladte og uinspirende stadion.

Det er synd for spillerne at de ikke får optimal opbakning til sådanne kampe. Det er tilmed en fornærmelse mod de gæstende hold og deres fans. Det er sikkert også økonomisk en dårlig forretning. Giv mig bare en god grund for at kampen skal spilles der?

Skotterne ved udmærket, at Italien spillede i Torshavn et par dage før. Hvorfor skal netop de nu transporteres over til dette øde sted? Tiden inden og efter en kamp er en stor del af oplevelsen, når man rejser langt for at følge sit hold. Skotterne vil givetvis – som de fleste andre fodboldfans – før og efter kampen opsøge alt hvad der er af pubber og spisesteder omkring banen. Hvor meget er der lige af det omkring Svangaskarði? Tænk hvis Færerne en dag skal møde Danmark og DBU vedtog, at den kamp kan vi passende spille Hanstholm?

Et landshold skal naturligvis have et og kun et nationalstadion at spille på. Det skal være Tórsvøllur, som har forudsætningerne for at blive et tæt atmosfærefyldt stadion, hvor der kan skabes resulater. Byg tribunerne sammen hele vejen rundt, så får vi en bedre arena end selv det kedelige stadion i Reykjavik. Løbebaner rundt om fodboldbaner burde iøvrigt forbydes!

Jeg ikke endnu ikke mødt nogen, der har kunnet forklare mig dette tosseri. Alle synes at være enige med mig. Når noget er så ulogisk og mod al sund fornuft kan der kunne være en årsag: Politik!

**Nogen må have besluttet, at det skal være sådan og nogen mangler nu modet til at sige fra: Lad os nu stoppe det pjat og gøre det eneste rigtige for vores spillere og tilskuere.**

Det kan så undre mig, at de mange fodboldelskende færinger ikke for længst har gjort oprør? Det samme gælder de kampe jeg har set på Færøsk TV. De kommenteres af 2 mand som ved en masse om fodbold. Det sidder de så og taler med hinanden om, medens kampen ruller forbi i baggrunden. Helt ærligt, så uengageret og kedelig TV fodbold har jeg aldrig set. Vi fodboldseere vil have begejstring og en fornemmelse af at være til stede på det stadion. Jeg ved at mange har løst problemet ved at slukke for TV-lyden og så høre radiolyden, men var det ikke på tide at få nogle af de fantastiske kommentatorer de har på Utvarp Føroyar til at gøre det!

Tórsvøller skal være Færøernes nationalstadion. Et sted der kan fyldes hver gang de store hold kommer. Hvor der er stemning både før, under og efter kampen. Hvor udenlanske gæster kan imponeres over at man her midt ude i atlanten kan skabe et lokalt ’Anfield Road’. Hvor spillerne kæmper til sidste åndedrag fordi på Tórsvøllur ’you never walk alone’. Det vil skabe resultater, så man ikke for evigt skal refere til Landskrona, men til Tórsvøllur, der hvor færingerne vinder!

Jeg håber de ansvarlige ledere vil lytte til denne kærlige opfordring og gøre det eneste rigtige for færøsk fodbold!